## DAGSINS MEINING

# Ongantíð fyrr hevur samfelagið riggað so illa

Útreiðslurnar til almenna umsiting eru øktar alt ov nógv seinastu árini, hóast formaður Tjóðveldisfloksins roynir at avnokta hetta. Hvat hevur so borgarin fingið afturfyri?

Ongantíð fyrr hevur samfelagið riggað so illa sum nú. Vit hava verkfall og arbeiðsmarknaðarósemjur so at siga hvørt ár, har tað fyrr plagdi at verða ár ímillum. Hvør hevur ábyrgdina av hesum?

Ein samgonga, ið útskrivar eykarokningar til skattgjaldaran uppá ein ósolidariskan máta, kann ikki frásiga sær alla ábyrgd, tá verkfall er. Fimmhundrað krónur eyka í sjónvarpsgjaldi vóru útskrivaðar herfyri uttan nakra politiska viðgerð. Hjá teimum lægst løntu og pensionistum eru fimmhundrað krónur nógvir pengar. Um verkafólkið fær fimm krónur meir um tíman, so merkir hetta, at tey skulu arbeiða eini 150 - 200 tímar, bert fyri at verða ajour, hvat sjonvarpi viðvíkur, og tá hava vit als ikki tosað um vanliga inflatión, ferðaseðlar, mjólk o.s.fr. Vil samgongan gera nakað munagott fyri meiniga føroyingin, so kundi hon lækkað sjónvarpsgjaldið aftur.

Fíggjarmálaráðið hevur ábyrgd av almenna arbeiðsmarknaðinum. Viðvíkjandi Fíggjarmálaráðnum og Lønardeildini, kunnu vit bert staðfesta, at vit ongantíð fyrr hava havt so nógv verkføll á almenna arbeiðsmarknaðinum uppá so stutta tið, sum seinastu árini. Mál, ið áttu at verið avgreidd við vinstru hond, sleppa at liggja og veksa, til tey gerast stórar óloysiligar konfliktir, sum eitt nú við Maskinmeistarafelagnum. Her er ov illa arbeitt hjá tí almenna, og avleiðingar eiga at takast. Vit hava eisini sæð, at landið ferð aftaná ferð tapir rættarmál ella noyðist at gera semju við fakfeløg og einstaklingar eftir brølarar í starvsfólkamálum. Aftur her eigur hetta at fáa avleiðingar fyri onkran, og tað er í hesum sambandi púra burturvið, at Løgmaður leggur starvsfólkamál til Fíggjarmálaráðið, ið uppá ongan máta hevur skarað framúr í umsiting av starvsfólkamálum.

Viðvíkjandi privata arbeiðsmarknaðinum, hevur tað politiskt verið reypað alt ov nógv um, hvussu væl tað stóð til í landinum í samband við alt ov stóra blokkniðurskurðin, og tað kann tí ikki koma óvart á nakran, at krøvini frá fakfeløgum gerast ov høg, og so slett ikki, tá hugsað verður um lækkandi og dýrkandi almenna tænastustøðið. Fakfeløgini hava sjálvsagt eina stóra ábyrgd, tá verkfall er, men tað er ov bíligt at geva teimum alla skyldina. Fakfeløgini eru ikki upfunnin undir sitandi samgongu, men hava verið aktiv í mong harrans ár, og tað sama ger seg galdandi við arbeiðsgevarnum. Tí er tað nógv ið bendir á, at ein stórur partur av trupulleikanum við illa fungerandi føroyska samfelagnum skal finnast aðrastaðni.

Formaður Tjóðveldisfloksins eigur at gevast við "vit eru syndabukkar" retorikkinum og heldur byrja at fáast við realpolitikk. Hesin hevur nú í fimm á verið yvirlatin til Fólkaflokkin, meðan reyp og klandur hevur eyðkent Tjóðveldisfloksins lut í samgonguni. Úrslitið er, at føroyska samfelagið er ringast fungerandi samfelag í Europa við verkfalsmeti. Hetta hevur evsti politiski myndugleiki ábyrgd av, tí skattgjaldarin hevur krav uppá eitt samfelag, har vaktarskipini sigla, og arbeiðsmarknaðurin fungerar.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Býráðsfundur í skundi

**Elin Lindenskov**
*býráðslimur í Havn*



Afturkomin av seturskúla í Noreg frætti eg, at Tórshavnar býráð hevur havt fund meðan eg var burturstødd. Fleiri fólk hava brikslað mær, at útvarpið hevur borið tey tíðindi, at »Elin Lindenskov ikki møtti á fundi«.

Tað er rætt, at eg ikki møtti á eykabýráðsfundi tann 13. mai – og at eg ikki hevði sent boð eftir varakvinnu míni, Rigmor Dam. Men orsøkin er einføld: Borgarstjórin hevur um teldupost kallað inn til eykabýráðsfund sama fyrrapart – hin 13. mai.

Av tí at býráðsfundur ikki skuldi verið aftur fyrr enn hóskvøldið 22. mai, fór eg avstað í góðari trúgv – so sum eg eisini hevði boðað býráðnum frá.

Eykabýráðsfundurin 13. mai samtykti at broyta byggisamtyktina fyri økið við Vallalíð, har heimið fyri minnisveik verður bygt.

Eg harmist almikið um ta gongd, hetta málið hevur fingið, tí um tað er nakað mál, ið hevur tørv á eini skjótari og virðiligari loysn, so er tað eitt mál, sum hetta.

# Nú er tað prógvað: Semingsstovnurin leggur ráð saman við Arbeiðsgevarafelagnum

**Høgni Høgnesen, semingsmaður og Suni Schwartz Jacobsen, varasemingsmaður boðsendu næstformanninum í Føroya Arbeiðsgevarafelag Kristoffur Laksá, at leggja ráð saman um, hvussu fakfeløgini skuldu tvingast at gera semju**

Í nátt kl. 01.20 góðtóku Arbeiðsgevarafeløgini 2. semingsuppskot frá semingsstovninum.

Frammanundan høvdu fakfeløgini havnað hesum uppskoti.

Klokkan 01.30 boðsendi semingsstovnurin umboð fyri fakfeløgni, og ørindini vóru at fáa fakfeløgini at umhugsa semingsuppskotið enn einaferð.

Løtu seinni boðaðu fakfeløgini yvir fartelefonina semingsmanninum Høgna Høgnesen frá, at feløgini stóðu fast og vildu ikki góðtaka semingsuppskotið, sum tey metta geva eina alt ov lítla lønarhækking.

Boðini frá semingsmanninum vóru, at nú fór semingsstovnurin at umhugsa um teir skuldu gevast við semingsroyndum sínum ella um semingsuppskotið skuldi sendast út til uratkvøðugreiðslu.

Frammanundan høvdu semingsmenninir fingið boð um, at fakfeløgini frá limum sínum høvdu fingið heimild at góðtaka ella vraka eitt møguligt semingsuppskot, og at feløgini tí ikki kundu góðtaka, at semingsstovnurin sendi eitt møguligt semingsuppskot út til uratkvøðugreiðslu.

Feløgini hava eisini víst á, at reglurnar um uratkvøðu er ódemokratiskar, tí teir persónar, sum ikki luttaka í atkvøðugreiðsluni verða roknaðir fyri at hava atkvøtt fyri uppskotinum. Hetta vita arbeiðsgevarnir, og tí eru teir so alltráir eftir at fáa semingsstovnin at senda semingsuppskotið út til ur-atkvøðugreiðslu.

Løtu seinni sendu semingsmenninir boð eftir næstformanninum í Føroya Arbeiðsgevarafelag, Kristoffur Laksá, hóast Arbeiðsgevarafeløgini longu høvdu góðtikið semingsuppskotið.

Hálvan tíma seinni, ringir semingsmaðurin Høgni Høgnesen til umboð fyri fakfeløgini, og sigur at semingsstovnurin nú hevði umhugsað um semingsuppskotið skuldi sendast út til uratkvøðu, men at semingsmaðurin skuldi umhugsa hetta nærri, og tí steðgaðu teir semingsroyndunum.

Júst í somu løtu, sum semingsmaðurin ringdi til umboð fyri fakfeløgini sóu fleiri umboð fyri feløgini, at Kristoffur Laksá smeyg sær út frá semings-stovninum og fór inn í kamarið við síðuna av (!), har arbeiðsgevararnir hildu til.

Tá arbeiðsgevarafeløgini longdu høvdu góðtikið semingsuppskotið og semingsmenninir sjálvir søgdu, at teir nú skulu umrøða møguleikan fyri at senda semingsuppskotið út til uratkvøðugreiðslu millum limirnar hjá fakfeløgunum, so er greitt **at Høgni Høgnesen og Suni Schwartz Jacobsen tilvitað hava latið næstformannin í Føroya Arbeiðsgevarafelag verið við í innanhýsis viðgerðini í semingsstovninum, um hvørt semingsupp-skotið skuldi sendast út til ur-atkvøðugreiðlsu.**

Tað er tí ikki semingsstovnurin, men **Arbeiðsgevarafeløgini** saman við semingsstovninum, sum tykjast skula taka støðu til um ein hin mest ódemokratiska atkvøðugreiðslan, sum ein kann hugsa sær, skal brúkast ímóti fakfeløgunum.

Høgni Høgnesen og Suni Schwartz Jacobsen hava við hesum avdúkað, at teir ganga ørindi fyri arbeiðsgevarasíðuna, og beinleiðis leggja ráð saman við arbeiðsgevarasíðuni, tá semingsroyndirnar fara fram.

Slíka framferð kunnu fakfeløgini ikki góðtaka, og vit átala harðliga, at semingsstovnurin ikki røkir uppgávu sína á ein sakligan og virðiligan hátt.

**Føroya Arbeiðarafelag**
**Havnar Arbeiðsmannafelag**
**Havnar Arbeiðskvinufelag**
**Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag**
**Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




Viðmerking frá Javnaðarflokkinum:

# Arbeiðsmarknaður í vanda

**Landsstýrið eitrar arbeiðsmarknaðarskipanina við at undirgrava gjørdar avtalur og við partískari uppílegging.**

Sáttmálaloysið hjá arbeiðarafeløgunum, politiskt ógyldaði sáttmálin millum Maskinmeistarafelagið og SEV og stríðið millum Fiskimálaráðið og Maskinmeistarafelagið. Hetta eru alt ósemjur, sum landsstýrið eigur eina høvuðsábyrgd av.

**Ørindarenning**
Ongin kann longur ivast í endamálinum við ógvusligu fráboðanini hjá Karsten Hansen, landsstýrismanni fyri Tjóðveldisflokkin, at hann fór at ógylda tann sáttmála, sum Maskinmeistarafelagið og SEV høvdu undirskrivað og brúkt. Hetta var ein – helst bíløgd – uppílegging fyri at stuðla arbeiðsgevarasíðuni í samráðingunum á privata arbeiðsmarknaðinum.

At landsstýrismaðurin bíðaði í vikuvís – ja, líka til beint áðrenn semingsstovnurin kom uppí samráðingarnar – er í sjálvum sær prógv fyri hesum. Og ikki minst, tá hugsað verður um, at SEV meira enn einaferð hevði goldið út lønir eftir sáttmálanum. Henda stuðul hevur arbeiðsgevaraparturin sanniliga eisini brúkt, soleiðis at sáttmálatrætan er blivin drúgvari enn neyðugt. Argumentini hjá arbeiðsgevarunum og landsstýrismanninum hava verið væl samskipað.

**Niðurgera arbeiðarafeløg**
Hevur onkur verið, sum helt, at landsstýrismaðurin enn einaferð var ómedvitað klossutur, tá hann kom við síni fráboðan, so undirstrikaði fíggjarmálaráðharrin sína partísku uppílegging í útvarpinum 21. mei. Har endurtók hann síni sjónarmið og fór enntá longur í sínum stuðli til arbeiðsgevarapartin. Uttan at koma við nøkrum prógvgrundum, reksaði hann upp sjónarmiðini hjá arbeiðsgevarunum og gjørdi tey til síni.

Men Karsten Hansen er ikki einsamallur. Hann hevur sanniliga flokk sí aftan fyri seg. Formaður Tjóðveldisfloksins hevur alment lýst landsstýrismanninum sín fulla stuðul.

Javnaðarflokkurin vendir sær harðliga ímóti tí ágangi ímóti føroysku fakfelagsrørsluni, sum landsstýrið og arbeiðsgevarafelag í hesum døgum sýna. Tey, sum nú stríðast fyri at fáa lut í vøkstrinum eru tey somu, sum bóru tyngstu byrðarnar, tá kreppan leikaði, og tey eiga betri uppiborið enn ta niðurgering, sum vit nú eru vitni til.

**Tænastumannaskipan undirgrivin**
Fyri 2 árum síðan eftirlíkaði Maskinmeistarafelagið landsstýrinum og gjørdi ein sáttmála, har maskinmeistararnir á vaktarskipunum gjørdust tænastumenn. At hetta hevur verið ein álvarslig avgerð, kann ongin ivast í. Tá eitt fakfelag letur limir sínar gerast tænastumenn, letur tað samstundis frá sær sítt evsta vápn – verkfalsrættin. Tænastumenn hava ikki møguleika at seta tiltøk í verk fyri at betra um síni kor. Tí liggur eisini ómetaliga stór ábyrgd á landsstýrinum at virða broyttu støðuna og ikki misbrúka, at fakfelag ikki hevur sama møguleika at seta tiltøk í verk.

Men landsstýrið gjørdi júst tað, tað ikki átti. Í áravís drálaði landsstýrið at fáa eftirlønarviðurskiftini hjá maskinmeistarunum á vaktarskipunum í rættlag. Hóast júst eftirlønarviðurskiftini eru ein hin mest týðandi táttur í tænastumannaskipanini. So langt dróg landsstýrið málið út, at maskinmeistararnir at enda kendu seg noyddar í felag at siga størvini upp. Og har standa vit so nú. Ein ósemja, sum í langa tíð fer at hanga, sum eitt myrkt skýggj yvir arbeiðsmarknaðinum.

Klossuta framferðin hjá landsstýrinum í tænastumannamálinum hjá maskinmeistarunum er ein bumba undir allari tænastumannaskipanina. Grundleggjandi spælireglurnar eru brotnar. Avleiðingin verður, at fakfeløg hereftir fara at halda seg langt burtur frá øllum royndum at gera starvsbólkar til tænastumenn.

**Samráðingarrætturin ein hvørvisjón**
Triðja sáttmálagølan er trætan um sáttmálan millum SEV og Maskinmeistarafelagið. Alt meýan landsstýrið heldur uppá, at støða tess er, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum skulu samráðast sjálvir, gera tey í verki tað øvugta. Fyri at renna ørindi fyri arbeiðsgevararnar í øðrum samráðingum, siga tey seg vilja ógylda sáttmálan, sum er undirskrivaður, og sum maskinmenninir hjá SEV longu hava fingið løn eftir.

Henda uppílegging kom eftir at Føroya Arbeiðsgevarafelag hevði mótmælt, at SEV hevði undirskrivað sáttmálan. At landsstýrismaðurin nú við harraboðum trýstir SEV at taka sáttmálan aftur, ger samráðingarrættin til eina hvørvisjón. Tann samráðing, sum fer fram undir slíkum tvingsli og háttanum er ikki annað enn eitt eiti, sum ongin kann taka í álvara. Úrslitið verður ein forpestaður arbeiðsmarknaður, har ongin veit, hvar vit flóta. Og tað kann so ikki verða til gagns fyri nakran.

**Samfelagsoyðileggjandi**
Øll orsøk er at rópa varskó. Sitandi samgonga er farin undir eina miðvísa herferð ímóti teim reglum, sum hava eyðkent okkara arbeiðsmarknað í mannaminni. Endamálið er fyrst og fremst at undirgrava fakfelagsrørsluna í Føroyum. Men í longdini fer hetta at raka alt samfelagið og seta menningina – búskaparligu, sosialu og mentunarligu – nógv ár aftur.

Javnaðarflokkurin ávarar ímóti hesi gongd. Vit fara av øllum alvi at berjast ímóti hesum politikki og heita á allar rætthugsandi føroyingar at stuðla hesum stríði.

**Starvsnevd Føroya Javnaðarfloks**

# Eri errin av politikki Tjóðveldisfloksins til frama fyri verkafólkið

**Høgni Hoydal**



Dimmalætting, Sosialurin, javnaðarflokkurin og sambandsflokkurin og mong lesarabrøv gera Karsten Hansen og Tjóðveldisflokkin til syndabukk fyri eitt verkfall á privata arbeiðsmarknaðinum. 0g øll arbeiðarafeløgini hava gjørt tað við stórum lýsingum í bløðunum.

Eg haldi tað vera undir alt lágmárk og sera ábyrgdarleyst at leggja eftir Karsten Hansen og Tjóðveldis-flokkinum. Har eru ongar grundgevingar. Bert pástandir og róp, sum onki hald hava í veruleikanum.

Men hetta tykist eftirhondini so vanligt í Føroyum. At tey, sum standa við sína ábyrgd, fáa skolurnar. Meðan tey, sum altíð skúgva ábyrgdina frá sær, sleppa undan at standa til svars og grundgeva fyri sínum gerðum.

**Endurtak eina lygn nóg ofta**
Seinasta royndin hjá Jóannesi Eidesgaard at spæla verkafólkavinur og sláa partapolitiskt platt uppá nakað so álvarsligt sum eitt verkfall og korini hjá arbeiðarafjøldini, ber prísin. Soleiðis tosa og skriva bert fólk uttan ábyrgd. Sum halda, at verkafólk gloyma skjótt og ikki duga at hugsa sjálvi.

Jóannes Eidesgaard tosar tildømis aftur ósatt um hækkaðar útreiðslur hjá tí almenna, hóast hann veit betur. Ja, teir pengarnir eru fyrst og fremst farnir til lønarhækkingar hjá øllum fakbólkum. Til barsilsskipan, avtøku av karensdøgum, lestrarstuðul, hækkaðar pensiónir, skúlaverkið, sjúkrahúsverkið, eldraøkið, serforsorg, til almannaverkið og til íløgur í eitt betri samfelag.

Vit hava rætt og slætt hækkað tær almennu útreiðslurnar til tey økir, ið skapa betri kor og betri framtíð hjá øllum landinum - til alt tað sum varð niðurpínt, tá Jóannes Eidesgaard sat í samgongu og brúkti allan blokkstuðulin. Nú gera vit tað við at byggja á okkara egnu framleiðslu og ikki danskan blokkstuðul. Og vit brúka framvegis minni enn vit tjena.

Samstundis hava vit seinastu 5 árini framt teir munadyggastu og mest sosialt rættvísu skattalættarnar, enn í nøkrum øðrum samgonguskeiði.

Men Jóannes Eidesgaard heldur seg til setningin um, at bara tú endurtekur eina lygn nóg ofta, um at "tær almennu útreiðslurnar bara hækka", so skulu fólk trúgva tí.

**Karsten og Tjóðveldisflokkurin gera sína skyldu**
Karsten Hansen hevur, áðrenn sáttmálin varð undirskrivaður millum SEV og Maskinmeistarafelagið boðað SEV frá síni støðu. Hann hevur ábyrgd og skyldu sum landsstýrismaður at gera hetta.

At SEV kortini hevur undirskrivað sáttmálan, er teirra ábyrgd. SEV er ikki ein privatur arbeiðsgevari, men veit, at tað skal góðkennast av landsstýrismanninum.

Hetta svarar til, at ein fakfelagsleiðari skrivaði undir sáttmála við tí fyri-varni, at limirnir skuldu góðkenna hann á uratkvøðu. Fall uppskotið - ja, so hevði tú ikki kunnað lastað limunum tað. Serliga ikki, um teir frammanundan høvdu boðað frá, at teir fóru at vraka sáttmálan.

Tí er tað als ikki at leggja seg út í partarnar á arbeiðsmarknaðinum, tá Karsten Hansen hevur staðið við sína ábyrgd. Hann er ein partur í málinum, og hevur tikið við síni ábyrgd.

Sjálvandi vil og skal Karsten Hansen ikki góðkenna ein slíkan sáttmála. Hann skal seinni í heyst skal samráðast við øll fakfeløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum, og vit hava als ikki ráð til slíkar lønarhækkingar í løtuni hjá tí almenna.

Og vil nakar í fullum álvara vera við, at um Karsten Hansen bara hevði góðkent ein sáttmála hjá SEV, so var onki verkfall á privata arbeiðsmarknaðinum og alt var gott?

Hetta eru berar undanførslur. Nei, størri álit hava vit á pørtunum á privata arbeiðsmarknaðinum, enn at teir skulu hanga sínar samráðingar uppá, hvat ein interkommunalur felagsskapur ger uttan góðkenning. Teir hava sjálvandi sínar grundgevingar og fyrireikingar uppá pláss í samráðingum.

**Tjóðveldisflokkurin stendur við sína stevnu**
At so andstøðuflokkarnir á tingi halda seg kunna spæla verkamannavinir og royna at koyra partapolitikk uppí samráðingarnar, er ikki annað enn væntandi. Eftir mínum tykki er tað reint ábyrgdarloysi og eg haldi, at úrslitini tala fyri seg.

Tjóðveldisflokkurin hevur altíð vart rættindini hjá verkafólki, og tað fer hann altíð at gera. Hesi seinastu 5 árini, meðan Tjóðveldisflokkurin hevur sitið í landsins leiðslu og við fíggjarmálum, eru korini og rættindini hjá øllum fakbólkum betrað stútt og munandi. Um nakar kann vísa á eitt annað 5 ára skeið, har so nógvir batar í korunum hjá fakbólkunum eru framdir, so lurti eg fegin. Um nakar kann vísa á, at gjógvin millum verkafólk og hinar fakbólkarnar er vaksin hesi seinastu 5 árini, so lurti eg eisini fegin.

Til dømis vildi fegin eg hoyrt, hvørjir batar hendu, tá Verkamannafylkingin við navnframum fakfelagsfólki sat á tingi og í samgongu frá 1994-1998? Og hvør politikkur til frama fyri verkafólk varð førdur, tá teir flokkar, sum nú spæla verkamannavinir, sótu við landsins leiðslu í hesum tíðarskeiði?

**Politiskt ábyrgdarloysi gagnar ikki verkafólki**
Karsten Hansen hevur gjørt sína skyldu sum landsstýrismaður í øllum samráðingum, hann hevur havt ábyrgdina av. Og hann hevur havt truplastu uppgávuna yvirhøvur at standa fyri fíggjarpolitikki, búskapi og samráðingum, eftir at alt varð niðurpínt og afturúrsiglt í nærum 10 ár.

Karsten Hansen hevur kunnað staðið við alt tað, sum hann hevur avtalað. Tað kunnu øll feløg, sum hava samskift við hann, vátta. Hann hevur lagt dent á, at besta trygdin fyri betri korum, er, at vit hava skil á búskapinum. Og at vit gera avtalur um eina trygga og stabila gongd, har vit kunnu halda tað, vit lova. Tað er politikkurin hjá Tjóðveldisflokkinum.

Tað hevði verið lættasta ting av verðini hjá Karsten Hansen og Tjóðveldisflokkinum at spælt jólamaður, og so bara blaka ábyrgdina og avleiðingarnar til onkran annan at taka upp.

Tað gera vit ikki. Tí vit vita, at tað eru altíð tey lægstløntu, sum koma at gjalda fyri politiskt ábyrgdarloysi. Hygg bert fá ár aftur í tíðina.

At lova nógv í góðum tíðum og so bara at skerja alt, tá alt er koyrt niður, skal ongantíð henda aftur, meðan Tjóðveldisflokkurin hevur ábyrgd.

**Stoltur politikki Tjóðveldisfloksins**
Eg eri stoltur av tí góða, Tjóðveldisflokkurin hevur framt í verki. Eisini av tí skattalætta, har vit hava barst og fingið undirtøku fyri, at júst verkamannalønin skuldi fáa størsta og veruliga ágóðan.

Og eg kann lova, at Tjóðveldisflokkurin eisini vil standa við ábyrgdini av teimum ópopuleru tingunum, vit sjálvandi hava gjørt og fara at gera frameftir.

Eri vísur í, at tað einasta sum í longdini gagnar verkamannafjøldini og øllum samfelagnum er ein politikkur, har øll taka ábyrgd her í landinum, og ikki renna undan henni og royna at geva øðrum skyldina av sínum egnu avgerðum.

Eg leggi onki í, at tað eftir øllum at døma er vorðið kostnaðarleyst hjá øllum at spilla Tjóðveldisflokkin út alment, uttan at hava nakra grundgeving ella nakað ítøkiligt at vísa á.

Um so bløðini fyllast við lýsingum, har Tjóðveldisflokkurin verður spiltur út, so fer Tjóðveldisflokkurin at standa við sína hugsjón og at fremja hana í verki - verkafólkinum og øllum samfelagnum at frama.

Eg undrist bert á, at pengar hjá fakfelagslimum skulu brúkast til at gjalda bløðum fyri ógrundað politisk álop.